# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ørkymlandi støða

Orðaskiftið á Hvonn avmyndaði eina ørkymlandi politiskari støðu. Onkur av luttakarunum nýtti enntá orðið kaos um samstarvsviðurskiftini millum samgonguflokkarnar. Nógv orka varð nýtt til tjak um fortíðina, sum politikkar opinberliga hava trupult við at gloyma. Síggja vit burtur frá munnhøggaríi um hvat, ið hendi undir fullveldissamgonguni og hvat, ið hendi undir fyrru ABC samgonguni, so avdúkaði orðaskiftið millum Høgna Hoydal, Jóannes Eidesgaard og Jøregn Niclasen nakrar álvarsamar politiskar trupulleikar, sum samgongan hevur trupult við at loysa. Orðaskiftið avdúkaði eisini, at partarnir aftan fyri ólavsøkupakkan eru avgjørdir um at fremja pakkan. Spurdur um Javnaðarflokkurin ikki var hvokkin av veljarakanningini, svaraði Jóannes, at flokkurin rak ikki politikk eftir veljarakanningum og hann endurtók síðani tað, sum hann áður hevur sagt nevniliga, at vælferðin skal skerjast. Hann vísti í hesum sambandi til nútímans javnaðarflokkar, sum ikki himpraðust við at skerja vælferðina.

Javnaðarflokkurin letur seg sostatt hvørki ávirka av norska valinum ella vánaligu veljarakanningini. Tað er torført at gita, hvat liggur aftan fyri hesa harðrendu støðu, sum heilt opniberliga kostar flokkinum atkvøður. Hetta kann helst tulkast sum enn eitt greitt signal til samgongupartarnar um, at Javnaðarflokkurin fer ongan veg – ella við øðrum orðum ein roynd at mana leysasøgurnar um, at flokkurin er á veg út úr samgonguni í jørðina.

Samantikið vísti orðaskiftið tveir samgonguflokkar, sum ætla at halda saman til tann beiska enda. Jóannes og Jørgen vóru samdir um, at fíggjarlógin fyri 2010, sum er á veg á tingborð, skal vera sveinastykkið hjá ABC 2 samgonguni. Megnar samgongan at semjast um eina fíggjarlóg innan teir karmar, sum samgongan sjálv hevur sett sær, so heldur hon valskeiðið út. Tað kann væl vera, men so kann verða spurt, hvussu valúrslitið hjá Javnaðarflokkinum fer at síggja út í mun til veljarakanningina. A og B fara ivaleyst at standa seg, tí politikkurin er júst tann, sum teirra veljarar forvænta. Kann tað sama verða sagt um støðu Javnaðarfloksins? Livst so spyrst.

Høgni Hoydal var tann beiski, sum stendur uttanfyri. Hann var afturlítandi at fullveldissamgonguni, sum Fólkaflokkurin hevði beint fyri, vísti á øll tey mál hjá CHE, sum fóru fyri bakka orskaða av samgonguslitinum, eitt nú fiskivinnupolitikkurin, útbúgvingarpolitikkurin og mentanarpolitikkurin. Tað tóktist, sum Jóannes hevði hug at geva honum rætt við tað, at hann óbeinleiðis viðgekk, at tað neyvan bar til at reka burðardyggan fiskivinnupolitikk við ABC 2.

Tað er áhugavert, at eitt nú Jóannes Eidesgaard nevndi nýggju valskipanina sum orsøk til tað kaos, sum valdar millum tingmenn. Nú landið er eitt valdømi, nýta ávísir tinglimir nógva orku til at markera seg. Vit hava her áður víst á hendan trupulleikan, sum er væl kendur í londum við somu skipan. Tað kann uttan víðari staðfestast, at politiska støðið ikki er hækkað av nýggju skipanini. Tað er ikki vorðið lættari at stýra landinum, eitt nú tí nýggja valskipain krevur ein politiskan búnaskap, sum alt ov nógvum tingmonnum manglar.

**Sosialurin**

## Føroyska heimsatlasið



**NIELS PETERSEN**
ritstjóri, Føroya Skúlabókagrunnur

Í Sosialinum 1. september í 2009 er Rolf Guttesen aftur farin í hernað móti Heimsatlasinum á ósakligan og niðrandi hátt. Føroya Skúlabókagrunnur leggur seg vanliga ikki út í blaðkjak um útgávur, men Skúlabókagrunnurin fer kortini í hesum føri at gera eitt undantak.

Rolf Guttesen skírir Heimsatlasið at vera størstu málspillingarroynd í føroyskum fakmáli í nýggjari tíð, gjørt av vælmeinandi, men ókønum fólki við ongari fakligari vitan, og Rolf Guttesen spyr, hví onkur amatørur skal sita og spæla sær við at umseta og týða nøkur hissini staðarnøvn í stóru verð.

Rolf Guttesen fer eftir týðaranum, Svenningi Tausen, sum um tað er týðarin, ið hevur ábyrgdina viðvíkjandi teimum týddu staðarnøvnunum. Í formælinum stendur greitt tilskilað, at atlasið er gjørt í samstarvi og samráð við nógvar stovnar, harímillum Føroysku Málnevndina, ið sum kunnugt er stovnur, sum Føroya Landsstýri hevur sett at taka sær av málrøktarspurningum. Eg kann upplýsa, at Málnevndin var við frá byrjan, tá ið farið varð undir at føroyska staðarnøvn, ið ikki vóru á føroyskum frammanundan. Serliga landanøvnini eru øll væl og virðiliga viðgjørd og endaliga staðfest í Málnevndini, eins og øll hini nøvnini í atlasinum eru viðgjørd og staðfest hjá Føroysku Málnevndini.

Undir navnaviðgerðini vendi Skúlabókagrunnurin sær somuleiðis til lærarar og onnur serkøn fólk, m. a. eisini landafrøðingar, jarðfrøðingar, alisfrøðingar og málfrøðingar, ikki einans í norðurlendskari málfrøði, men eisini í øðrum fremmandum málum. So staðarnavnaásetingin er ikki einmansverk, heldur tvørturímóti.

Nei, í sambandi við útgávuna hava allar góðar og positivar kreftir í hesum landinum samstarvað fyri at fáa eitt so gott úrslit um gjørligt. Lærarar og næmingar eru glaðir fyri atlasið, og Skúlabókagrunnurin fær stórt sæð bara positivar afturmeldingar. Týðarin Svenning Tausen hevur í hesum føri – sum so mangan í meiri enn hálva øld – gjørt eitt megnararbeiði føroyskum máli at frama.

Føroya Skúlabókagrunnur er opin fyri atfinningum, eisini viðvíkjandi Heimsatlasinum, men treytin má vera, at orðaskiftið er sømiligt. Tú fært einki mennandi kjak við at mæla til bókabrenning. Tí er okkara áheitan á Rolf Guttesen at lyfta kjakið upp á eitt hægri stig.

Tað er Føroya Skúlabókagrunnur, ið hevur givið Heimsatlasið út, og undirritaði ritstjórnaði heimsatlasinum og tekur fulla ábyrgd av tí. Hevur onkur viðmerkingar til atlasið og nøvnini í tí, fari eg at heita á tykkum, at venda tykkum til mín, so viðmerkingarnar saman við viðmerkingum frá øðrum kunnu verða tiknar til viðgerðar, tá ið nýtt atlas skal verða givið út.

## Sjúrður skrivar Sjikago
## Føroyskt heimsatlas og vit skriva Chicago!



**EYÐUN Á BORG**

Handan tíðargreinin hjá tær kundi verið betri. Nógv orð, gaman í, men innihaldið var fløkjaligt.

LEGG TEG SKERFLATAN: Soleiðis haldi eg meg duga at umseta hasa ensku yvirskriftina til føroyskt. Latt allar slúsur upp, so øll stavseting verður ein vavgreytur, har næstan alt ber til. Móðurmálið verður taparin.

CHICAGO: Halt teg til veruleikan, Sjúrður! Tú speirekur málvinir og Heimsatlas við at skriva Sjikago. Hatta er ósømiligt.

Chicago stendur í okkara frálíka heimsatlasi. Reglan er, at býir ikki verða føroyskaðir, bert lond. Soleiðis verður eisini gjørt kring heimin. Okkurt einstakt undantak er; sjálvandi skriva/siga vit Keypmannahavn, ikki København. Í enskum og fronskum broyta tey tó eisini býarnøvn: Køln verður broytt til Cologne.

Fert tú, Sjúrður, so lætt um veruleikan, tá tú viðgert málið um stavraðið á tingi, ja, so veit eg ikki, hvat vit kunnu vænta. Vónandi eru tingfólk á varðhaldi.

TVÆR TUNGUR Í SAMA HEYSI: Tú skrivar sum rættur tjóðskaparmaður/málvinur um tungumál, sum doyggja, at okkara ”lítla” mál er hótt, um Jóannes bónda og hansara málstrev á tingi, um danskar embætismenn og prestar, sum gjørdu seg ógvusliga inn á føroyskan navnasið.

Samstundis ætlar tú við tínum uppskoti at gera teg ógvusliga inn á móðurmál og stavseting og gongur beint ímóti hugsjónum Bóndans. Skilji tann, ið skilja kann! Zion í Kollafirði nevnir tú sum dømi um tínar víðu hugsjónir. Gev mær luft, sigi eg.

TJÓÐSKAPARPOLITIKKUR: Tú undrast, tí onkur heldur tað vera løgið, at tjóðskaparmaður skal koma fram við slíkum uppskoti. Lít teg íkring! Hvørjir eru ídnastu fjepparar tínir, t.d. í bløðunum? Er neyðugt at siga meir?

FOREININGIN: Onkur vil vera við, at ”Foreiningin” skal á fund saman við onkrari løgtingsnevnd, har stavraðið verður umrøtt. (Revar ansa gásum?) Nei, eg fái meg ikki at trúgva tí. Man málprofessarin annars vera boðin við?

KAP FARVEL:
Í Útvarpinum nú um vikuskiftið varð sagt, at eitt lágtrýst var við Kap Farvel. Stik den! So altjóðalig eru vit anno 2009. Er tað ikki hugaligt, Sjúrður?

Góði Sjúrður og góða løgting! Gerið ikki hasa óbótagerð móti móðurmáli okkara!

Á Borg á Argjum um heystjavndøgur 2009

***Við móðurmálskvøðu***

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.